

## Pavarotti deyður

Heimskendi tenorurin Luciano Pavarotti andaðist í nátt, 71 ára gamal. Pavarotti varð skorðin fyri krabbamein í fjør, og hann varð útskrivaður av sjúkrahúsi, men hann ilt við at koma seg heilt. Seinastu tíðina versnaði heilsustøðan alsamt, og í gjár varð alment boðað frá, at stóri maðurin var fallin í óvit, og at nýruni vóru hildin uppat at virka. Í farnu viku gjørdi italska stjórnin av at heiðra Pavarotti við serstakari virðisløn. Hetta fyri arbeiði hansara italskari mentan at frama.

# Smábáteigarar fáa ikki stuðul

**Løgtingsmenn vilja ikki geva fólk stuðul, sum hava ráð at keypa bátar fyri milliónir og Magni Laksáfoss vil ikki gera undantak í lógini**

BJARGINGARÚTGERÐ OG MVG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Allir teir túsundtals føroyingar, sum eiga smábát, sleppa heldur ikki framyvir undan at betala mvg av bjargingarútgerðini umborð

Tað gjørdi Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, greitt í fyrispurningi frá Kára P. Højgaard í løgtinginum í morgun.

Sjálvstýrismaðurin úr Eysturoy heldur at tað er órímiligt, at bátseigarar skulu betala mvg av bjargingarútgerðini umborð.

Hann vísir á, at tað er fáa staðni, at so stórur partur av fólkinum hevur egnan bát og harafturat heldur hann, at tað hevur sera stóran týdning at trygdin er so góð so gjørligt.

Hann hugsar serliga um, at farvatnið ímillum oyggjarnar er mangan baldrut og tí hevur tað serligan týdning, at bjargingarútgerðin er í lagi.

Men so leingi hon er óneyðuga dýr, er vandi fyri, at hon ikki verður skift út eftir forskriftunum og tí vil hann hava hana mvg fría.

### Onki undantak

Magni Laksáfoss gjørdi púra greitt, at mvg lógin er ikki ein studningslóg og miðja verður eftir at hava so fá undantøk, sum gjørlig í mvg lógini, fyri at gera hana lættari at umsita og fyri at máa støðið undan lógini.

Tí fer hann ikki at gera undantak, so at bjargingarútgerð verður mvg frí, tí tað er tað saman sum at lata studning.

Tað er eisini greitt, at landsstýrismaðurin fekk undirtøku frá flestu løgtingsmonnum, sum høvdu orðið.

Hendrik Old vísti á, at teir, sum hava vinnuligar bátar, fáa mvg endurgoldið.

- Men tað sær út til, at Kári P. Højgaard heldur, at allir, sum eiga luksusbátar, skulu eisini sleppa undan mvg.

Karsten Hansen helt, at teir, sum hava ráð at keypa bát fyri fleiri hundraðtúsund krónur, ella milliónir høvdu saktans eisini ráð at keypa bjargingarútgerðina og Tórbjørn Jacobsen helt, at álopini á mvg skipanini minti mest um valagn, har tað skuldi gjarast út til vælbjargaðar føroyingar, sum høvdu ráð at keypa bátar fyri milliónir.



*Teir, sum hava ráð at keypa bát fyri hundraðtals túsund, ella milliónir, hava eisini ráð at keypa bjargingarútgerð og tí skulu teir ikki hava almennan studning, halda fleiri løgtingslimir*

# Kann draga út at lata Hovstunnilin upp

**Men kanska letur hann upp upp um ein mánað, men so skal hann stongjast aftur í nakrar vikur næsta summar fyri at gera hann endaliga lidnan**

HOVSTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Miðað verður nú eftir at tunnilin ímillum Øravík og Hov kann takast í nýtslu um ein mánað.

Tað upplýsti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, í morgun.

Teir báðir løgtingsmenninir, Hergeir Nielsen og Johan Dahl, hava spurt landsstýrismannin, hvat tað er, sum forðar fyri, at tunnilin verður tikin í nýtslu, tí at síggja til, er hann liðugur.

Men hann er ikki liðugur, staðfesti landsstýrismaðurin.

Í Sosialinum mánadagin vistu vit at siga, at ætlanin var, at Landsverk skuldi yvirtaka tunnilin fríggjadagin, men tað vildi Landsverk ikki, tí alt var ikki, sum tað skuldi.

Bjarni Djurholm sigur, at tað eru ymsar tekniskar innleggingarnar í tunlinum, ið ikki eru, sum tær skulu.

### Stongjast næsta summar

Men tað er eisini ein annar stórur trupulleiki. Tað er at portalurin, sum er tað stoypta pettið í tunnilsmunnanum, øravíkarmegin, er heldur ikki sum tað skal, tí tað kemur ov stutt út úr tunlinum við teirri avleiðing, at vandi er fyri, at tað ríður á vegin.

Ætlanin var, at tað skuldi røkka longur út, men fjallið inni í tunlinum var so vánaligt, at tað var neyðugt at skumpa portalin longur inn enn ætlað, men stoypt varð upp í hann uttanfyri og tí røkkur hann ov stutt út.

Av trygdarávum er avgerð tí tikin um at longja portalin nakrar metrar, segði Bjarni Djurholm.

Annars skal tunnilin vera liðugur í desembur í ár eftir sáttmálanum og kanna verður nú eftir um tað ber til at longja portalin og gera tunnilin heilt lidnan áðrenn tíðarfreistin er úti.

Men letur tað seg ikki gera, ber til at tryggja tunnilsmunnan fyribils og at lata hann upp fyri almenna ferðslu. Verður tann loysnin vald, er ætlanin at gera tær teknisku innleggingarnar lidnar og so kann tunnilin latast upp í oktobur.

Men so verður neyðugt at stongja tunnilin aftur í nakrar vikur næsta summar fyri at gera portalin í tunnilsmunnanum endaliga lidnan.

Sjálvur vildi hann helst, at tað hevði borið til at latið tunnilin upp áðrenn veturin kemur, so at suðuroyingar sleppa undan fjallavegnum í vetur.

Nú skal hann hava eina frágreiðing frá Landsverki og so verður endalig støða tikin.

Kanna verður eisini um Landsverk skal krevja endurgjald frá Ístaki fyri eykakostnaðin sum stendst av at longja portalin.

Víst varð á, at tað er meiri enn eitt ár síðani, at Ístak gjørdi vart við, at Portalurin varð og stuttur og Bjarni Djurholm varð spurdur, hví hann so longu varð longdur fyri at sleppa undan at draga tað út at taka hann í nýtslu.

Men tað fekst onki svar til tann spurningin.



*Enn er ikki heilt greitt, hvussu verður við Hovstunlinum. Tað kann draga út at taka hann í nýtslu. Ein annar møguleiki er at taka hann í nýtslu um ein mánað, men so má hann stongjast aftur í nakrar vikur næsta summar*